# Umráðandi at vanda sær um reinføri undir fletting

**Nú flettingin er byrjað, gera Heilsufrøðiliga Starvsstovan og landslæknin aftur vart við týdningin av góðum reinføri og skynsamari hagreiðing til tess at byrgja uppfyri smittuvanda og mateitran**

REINFØRI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tað ræður um, at kjøtið verður viðgjørt á slíkan hátt, at sjúkuelvandi bakteriurnar ikki nørast. Tí eiga flettarar og hjálparfólk at vanda sær um persónliga reinføri, siga Heilsufrøðiliga Starvsstovan og landslæknin*

Hetta er tíðin, tá ið skurðfjøllini verða gingin, og menn fara at fletta, og í hesum sambandi vísa Heilsufrøðiliga Starvsstovan og landslæknin aftur í ár á, hvussu neyðugt tað er við reinføri, eitt nú fyri at byrgja uppfyri botulismu.

Neyðugt er at vísa stóran ans fyri reinførinum undir fletting. Soleiðis er umráðandi, at alt, sum kemur at kjøtinum, er so reint og frítt fyri sjúkuelvandi bakteriur sum gjørligt.

- Tað ræður um, at kjøtið verður viðgjørt á slíkan hátt, at sjúkuelvandi bakteriurnar ikki nørast. Tí eiga flettarar og hjálparfólk at vanda sær um persónliga reinføri, vera í reinum arbeiðsbúna og vaska sær væl og javnan um hendurnar.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan og landslæknin vísa á, at øll amboð og íløt, sum verða brúkt undir flettingini, eiga at vera væl reingjørd, áðrenn byrjað verður hvønn dag - og soleiðis eisini at verða hildin rein gjøgnum dagin.

- Um klútar verða nýttir at turka við, er sera umráðandi, at hesir eru hildnir reinir og helst skoldaðir. Undir flettingini skal eisini ansast eftir, at kjøtið ikki verður dálkað av gori, ull og skarni - og fiskur skal ikki koma at kjøtinum.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan og landslæknin mæla til, at krovið verður hongt í hjallin sum skjótast, so tað kølnar, og luft sleppur at tí.

- Kjøt eigur ikki at verða hongt upp at turka ella ræsa, um tað er heitt, vátt og stilt í veðrinum, siga stovnarnir báðir í vegleiðingini.

# Høgir bensinprísir elva til yvirgang

**11 fólk doyðu í Yemen í summar, tá ið tey mótmæltu høgu bensinprísunum**

YVIRGANGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

At gassoljan í Føroyum er dýrkað so nógv seinastu tíðina, at hvørt húsarhald við verandi prísum brúkar einar 6000 krónur meira í olju um árið og einar 3000 krónur meira í bensini á bilin, hevur higartil ikki elvt til tað heilt stóra høvuðbrýggi.

Landsstýrið sigur, at tað almenna hevur ikki ráð at minka um oljuavgjaldið - og enn minni at taka oljuavgjaldið av, nú landskassin aftur í 2006 fer at hava meira enn 200 miljónir krónur í halli.

**Yvirgangur**

Men aðrastaðni úti í tí stóru verð seta fólk seg beinleiðis upp ímóti, at bensinið er vorðið so dýrt - og í Yemen kostaðu mótmælini ímóti høgu bensinprísunum beinleiðis mannalív fyrr í summar.

Tá ið politiska leiðslan í Yemen í summar tók burtur eitt ískoyti til bensin, gjørdist høvuðsstaðurin í landinum, Sanaa, ein ruðulleiki við fólki, sum mótmæltu hesum.

Mótmælisfólk framdu atsóknir móti fleiri stjórnarbygningum við steinum; tey brendu bildekk í gøtunum og blokeraðu vegir.

Løgreglan svaraði aftur við táragassi og vatnkanónum.

So hart gekk tað fyri seg í Sanaa, at ikki færri enn 11 fólk doyðu í tilburðunum.




## Álopin og sligin

Tað er sjáldan, at eitt vikuskifti fer aftur um í Havn, at løgreglan ikki hevur okkurt at gera - og soleiðis var eisini sunnunáttina

Í miðbýnum í Havn sunnunáttina vórðu tveir dreingir álopnir og slignir av einum øðrum manni, og løgreglan heldur, at hetta málið er á markinum til eitt harðskapsmál.

Á løgreglustøðini í Havn sigur vakthavandi, at partarnir í hesum máli verða avhoyrdir og síðan verður støða tikin til, hvat meira hendir.

- Men soleiðis, sum málið sær út, bendir mangt á, at hetta er eitt harðskapsmál, har dreingirnir eru álopnir - og annar er sligin, sigur løgreglan.


Hi-Fi
damor

37" LCD Flat Sjónvarp




37" LCD-Sjónvarp av merkinum Viewpia har tú fært nógv fyri pengarnar. Tað hevur eina upploysn uppá 1366 x 768, og við DVI inngangi er tað klárt til HDTV. Tað hevur tveir tunarar og eina hátalaraeffekt uppá 2x10Watt. Responstíðin er heilt niðri á 8ms!!!
Vanligur prísur 17.998,-

Thomson 20" Sjónvarp




Scart stikk og front AV · Tekstvarp og fjarstýring

Panasonic CQ-C1011N Bilradio




CD og FM/AM Radio · Forsterkara útgang

MDS AC-4 Forsterkari




4 Útgangir
Total effekt 620W
Fyrr 2.498,-

MDS Hátalari




6x9" 4 vegis hátalari · 500W (250W RMS)

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor